















*Myndir: ÁlvurHaraldsen*



# ÚT VIÐ 3000 FÓLK Á FJARÐA-FESTIVALI Í SKÁLAFIRÐI

**FESTIVALUR** - Fríggjakvøldið og leygarkvøldið vóru eini 1000 fólk til konsertirnar. Vit eru sera væl nøgd við undirtøkuna, og vit eru longu farin í holt við at fyrireika fjarðafestivalin komandi ár, sigur stjórin, Vinjard Johansen, sum vegna stigtakararnar takkar fyri dyggu undirtøkuna

Vilmund Jacobsen

Hin fimmti fjarðafe-stivalurin í røðini er nú av og stjórin í felagnum, sum stendur aftanfyri stóra tiltakið, er væl nøgdur við dyggu undirtøkuna, sum festivalurin fekk.

Vinjard Johansen sigur, at hann og øll hini, sum standa aftanfyri tiltakið, fegnast um, at út við 3000 fólk aftur hesaferð vitjaðu ymisku tiltøkini og konsertirnar í Kelduni, í tjaldinum og fjarðalandið, sum børnini rættiliga tóku til sín.

- Vit eru sera væl nøgd og takksom fyri dyggu undirtøkuna. Eini 1000 fólk vóru til konsertirnar bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið, og bæði kvøldini vóru soleiðis líka væl vitjað. Fríggjakvøldið vóru tað útlendsku nøvnini sum drógu, og leygarkvøldið vóru tað tey føroysku. Veðrið eydnaðist so frálíka væl, og bæði kvøldini vóru líka væl vitjað.

## Brian savnaði

Vinjard vísir á, at nógv fólk vóru í Kelduni fríggjakvøldið, sum ikki vanliga koma á slík støð, og tað sigur hann seg fegnast almikið um.

- Konsertin hjá fyrrverandi guitaristinum í rockbólkinum Korn, Brian Welch, savnaði soleiðis nógv fólk úr ymiskum aldursbólkum, sum ikki hava sína vanligu gongd í Kelduna.

Vinjard fegnast um, at tey kundu borðreiða við tiltøkum, sum hava so breiðan áhuga millum fólk, og tey eru eisini sera fegin um, at tað eydnaðist teimum at fáa eitt so stórt navn til Føroya.

Fjarðafestivalurin vardi hesaferð í eina heila viku.

- Lagt varð fyri við seminari, og festivalurin endaði sunnudagin við møti í Kelduni, har millum 400 og 500 fólk lýddu á, sigur Vinjard Johansen.

Hann sigur, at konseptið við at hava konsertirnar ávikavist inni í Kelduni og úti í tjaldinum eydnaðist ógvuliga væl.

- Tá ein framførsla var liðug inni í Kelduni, fór tað næsta í gongd í tjaldinum. Hetta gjørdi, at eingin steðgur var millum framførslurnar eins og tey, sum fóru á pallin, kundu hava sínar ljóðroyndir í frið og náðum, sigur hann.

Ymisku tónleikaframførslurnar á fjarðafestivalinum byrjaðu hóskvøldið og hildu fram til og við leygarkvøldið.

## Hongur saman

Tey, sum standa aftanfyri fjarðafestivalin, eru longu farin undir at fyrireika ein nýggjan festival, sum verður